## Magni keypti fyri 3 mió

Stjórarnir í Atlantic Airwats halda eftir øllum at døma, at felagið er ein góð íløga. Í øllum førum átti Magni Arge størsta insider-handilin, sum varð kunngjørdur í samband við skrásetingina av felagnum. Ikki færri enn 11.497 partabrøv hevur stjórin í felagnum keypt umvegis íløgufelagið 11. Juni 2007. Og við kursi á 261 svarar hetta til 3 mió kr. Av øðrum insider-handlum kann nevnast, at Marius Joense, sum eisini er stjóri, keypti fyri 900 tkr., meðan Erling í Liða og Christian Andreasen báðir keyptu partabrøv fyri 250 tkr.



## Virðið er fallið

Í nýggjari greining staðfestir Føroya Banki, at kursurin á Atlantic Airways partabrævinum er lækkaður, síðani virðisásetingin varð gjørd. Í greiningini er staðfest, at marknaðurin sum heild er lækkaður, síðani virðisásetingin varð gjørd, og tí er fyrimunurin, sum oftast verður givin við eini skráseting, nú burturi. Føroya Banki mælir í greining sínari til, at eigarar av partabrævinum eiga at umhugsa sølu, um kursurin kemur upp á 287

# Atlantsflog skrásett

**Klokkan tíggju í morgun varð fjórða føroyska fyritøkan børsskrásett, hesaferð á ICEX/OMX.**

VIRÐISBRØV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*




*Landsstýrismaðurin nýtti eisini høvið at takka øllum teimum, sum hava verið við í privatiseringstilgongdini, og ynskti felag og starvsfólkum tillukku við børsskrásetingini.*

Tað var ein hátíðarløta fyri øll við tilknýti til Atlantsflog, tá felagið í morgun varð skrásett á íslendska børsinum.

Christian Andreasen, nevndarformaður í Atlantsflog, var fyrstur at taka orðið, og hann segði millum annað, at tilgongdin við at einskilja felagið hevur verið drúgv og arbeiðið at lista felagið hevur eisini verið rættiliga umfatandi. Tilgongdin hevur verið strævin, men eisini sera lærurík.

- Eg fari at takka øllum, sum hava luttikið í hesum arbeiði, og takka fyri gott samstarv. Vit hava gjøgnum alla málsgongdina havt eitt sera gott samstarv vikð Vinnumálaráðið. Eisini samstarvið við Kaupthing, sum hevur verið ráðgevi hjá landsstýrinum, hevur verið fyrimyndarligt. Eisini skal eg takka ICEX fyri gott samstarv, segði Christian Andreasen.

Hann vísti eisini á, at einskiljingin av felagnum hevur kravt nógv av leiðslu og starvsfólki, sum eisini hava gjørt ein megnar innsats í hesum sambandi.

Ein annar, sum eisini helt røðu í sambandi við børsskrásetingina, var Sigurd Poulsen frá Virðisbrævamarknað Føroya. Hann nevndi, at Atlantsflog er fjórða føroyska fyritøkan á børsinum, hinar eru sum kunnugt Atlantic Petrolium, Føroya Banki og Eik Banki.

Marknaðarvirði av børsskrásettum virðum er farin úr trimum milliardum í 2006 upp í meiri enn tíggju milliardir í 2007.

### Ikki bara eftir vild

Men ikki alt hevur gingið so, sum VMF hevði roknað við í 2003. Tá varð mett, at vit í 2007 fóru at hava nígggju fyritøkur skrásettar á børsinum umboðandi 30% av GDP. Nú er talan um fýra fyritøkur við 70% av GDP.

- Tað er væl klárað og er á sama støði sum danskar fyritøkur á OMX í Keypmannahavn, segði Sigurd Poulsen.

Hann segði annars tíðina verða komna at kunna útlendskar íleggjarar meiri um føroysku børsskrásettu fyritøkurnar, og fyrsta stigið í hesi ætlan verður longu í morgin, tá eitt seminar verður hildið í íslandi fyri áhugaðum íleggjarum.

Seinni, tíðliga komandi ár, verður skipað so fyri, at íslendskir íleggjarar kunnu koma til Føroya, so teir sjálvir kunnu seta seg inn í møguleikarnar her.

Stjórin í Atlantsflog, Magni Arge, helt sjálvandi eisini røðu hendan søguliga dagin fyri felagið.

- Komandi tíðir fara at føra við sær møguleikar, avbjóðingar og krøv. Vit hava nú skyldu at fylgja teimum leikreglum, sum eru galdandi fyri børsskrásettar fyritøkur. Marknaðurin fer hvønn dag at meta um okkara avrik. Hetta gevur eitt nýtt parametur til okkara framman undan dynamiska gerandisdag, segði Magni Arge og legði aftrat, at avbjóðingarnar kunnu skifta frá skýfríum til yvirskýggjað og turbulent til tíðir.

### Stórur dagur

At Atlantsflog nú er børsskrásett kennist sum eitt náttúrligt næsta stig, sæð í ljósinum av teirri menning, felagið hevur havt seinastu árini, ikki minst tað virksemi, felagið hevur uppbygt uttanfyri landoddarnar, segði Magni Arge.

Stjórinj í Atlantsflog var serliga fegin um, at so nógvir føroyingar hava nýtt høvi at seta pening í felagið, og hann segði tað vera beinleiðis hjartanemandi at síggja, at so nógv starvsfólk hava sett pening í sítt arbeiðspláss.

- Hetta vísir, at starvsfólkini trúgva upp á Atlantsflog, segði Magni Arge.

Eisini landsstýrismaðurin í Vinnumálum helt røðu hendan hátíðardagin í hangarini vetsuri á flogvøllinum.

Hann segði seg hava sæð fra móti hesum degnum líka síðani løgtingið samtykti at privatisera triðing av flogfelagnum.

- Hetta er fyrstu ferð, at landsstýrið er beinleiðis seljari av einari fyritøku. Tá Føroya Banki varð privatiseraður, var Fíggingargrunnurin millum banka og landsstýri, vísti Bjarni Djurholm á.

Men hóast landsstýrið hevur verið einasti eigari av Atlantsflog, so hevur landsstýrismaðurin ongantíð blanda seg í, hvussu felagið hevur verið rikið.






